## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag :**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og sum frálíður regn. Út á seinnapartin upp í hvassan vind av útsynningi og ælingur. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av vestri og ælingur, men eisini sólglottar. Um kvøldið veksur hann vindin av eystri og regn ella mjørki. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið Fríggjadagin:**
Fyrrapartin stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi, um middagsleitið eitt skifti minni vindur, men um kvøldið skrið av útnyrðingi. Ælingur, men onkur sólglotti og hitin millum 7 og 10 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av suðri og regn, sunnudagin strúkur í vindi av útsynningi og vestri og ælingur. Hitin millum 6 og 10 stig.

# FM-kapping í Settlers

**Tveir teir bestu føroyingarnir sleppa við, tá HM-kappingin í væl umtókta spælinum verður í Týsklandi um miðjan oktober**

SETTLERS
*Jákup Mørk*



*Settlers hevur seinnu árini vunnið alt meira frama. Nú verður so skipað fyri almennari FM-kapping, og bestu føroyingarnir fáa sum bonus møguleika at taka lut í HM-kappingini, sum verður í Essen í Týsklandi*

Leygardagin 24. september verður FM-kapping hildin í Settles, sum er eitt av teimum heilt væl umtóktu familjuspælunum, sum hava vunnið fram seinnu árini.

Frá fyrireikarunum verður sagt, at tað enn eru fleiri pláss tøk til kappingina, sum í ár veruðr stuðlað av Atlantic Airways og Thomas Dam á Hálsi. Tiltakið fer fram í Bridge-húsinum, og frá fyrireikarunum verður sagt, at spælt verður við altjóða reglum. Tað vil altso siga, at tað er standard-útgávan av spælinum og standard-reglur, sum verða nýttar.

Og tað er ikki hissini vinningur, sum til ber at ogna sær. 14-16 oktober verður nevnliga kappast um heimsmeistaraheitið í Settlers, og fer kappingin í ár fram í týska býnum, Essen. Føroyar hava fingið tilluta tvey pláss í kappingini, og sleppa teir báðir bestu føroysku luttakararnir soleiðis eisini við til HM-kappingina, har luttakarar úr ikki færri enn 31 londum fara at taka lut.

Sagt verður annars frá fyrireikarunum, at luttøkan í FM-kappingini kostar 100 kr., og fer tilmelding fram á teldupost-adressuni, settlers@kallnet.fo. Lagt verður afturat, at luttakarar skulu vera fyltir 18 ár.

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | 0 |
| Nuuk | 2 |
| Qaqortoq | 5 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 6 |
| Seyðisfjørður | 6 |
| Tórshavn | 12 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 14 |
| London | 17 |
| Tromsø | 7 |
| Bergen | 14 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 17 |
| Keypmannah. | 15 |
| Helsinki | 13 |
| Moskva | 12 |
| Berlin | 17 |
| Warzawa | 17 |
| Kiev | 15 |
| Bukarest | 10 |
| Paris | 18 |
| Madrid | 20 |
| Róm | 23 |
| Malorca | 20 |
| Athen | 27 |
| Malta | 26 |
| Tunis | 26 |
| Beijing | 21 |
| New Dehli | 32 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 17 |
| New York | 28 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 19 |
| Meksikobýur | 20 |
| Panama | 24 |
| La Paz | 9 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 18 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 1002 hPa. í útsynning úr Føroyum fer í landnyrðing. Eitt annað lágtrýst, 1002 hPa. sunnan fyri Hvarvið fer móti Skotlandi og dýpist.




**Í dag:**
Lágtrýstið í landsynning úr Hvarvinum – ex "OPHELIA" - kemur hendavegin og dýpist.

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 19/9 kl. 06[00]– 20/9. 06[00]. Hitin í gjár: 9,3°
Minsti hiti máldur í sept.: - 0,5° - Mesti hiti máldur í sept.: 19,5°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 9,0 mm – mált frá 19/9 kl. 06[00]– 20/9 kl. 06[00]
Avfallið higartil í september: 80,5 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

16. september Mánin næstur jørðini
18. september Fullmáni
25. september Seinna kvarter
28. september Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmanna-sundi fp. | Vestmanna-sundi sp. | Mykines-firði fp. | Mykines-firði sp. | Nólsoyar-firði fp. | Nólsoyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 21. Sept | 09.47 | 22.11 | 08.47 | 21.11 | 09.02 | 21.26 | 11.47 | - | 00.23 | 12.47 | 08.02 | 20.26 |
| 22. Sept | 10.36 | 23.01 | 09.36 | 22.01 | 09.51 | 22.16 | 00.11 | 12.36 | 01.11 | 13.36 | 08.51 | 21.16 |
| 23. Sept | 11.27 | 23.52 | 10.27 | 22.52 | 10.42 | 23.07 | 01.01 | 13.27 | 02.01 | 14.27 | 09.42 | 22.07 |
| 24. Sept | - | 12.18 | 11.18 | 23.58 | 11.33 | - | 01.52 | 14.18 | 02.52 | 15.18 | 10.33 | 23.13 |
| 25. Sept | 00.58 | 13.38 | - | 12.38 | 00.13 | 12.53 | 02.58 | 15.38 | 03.58 | 16.38 | 11.53 | - |

| Dagur | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvanna-sundi fp. | Hvanna-sundi sp. | Fugloyar-firði fp. | Fugloyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 21. Sept | 07.02 | 19.26 | 10.02 | 22.26 | 11.02 | 23.26 | 09.32 | 21.56 | 10.47 | 23.11 |
| 22. Sept | 07.51 | 20.16 | 10.51 | 23.16 | 11.51 | - | 10.21 | 22.46 | 11.36 | - |
| 23. Sept | 08.42 | 21.07 | 11.42 | - | 00.16 | 12.42 | 11.12 | 23.37 | 00.01 | 12.27 |
| 24. Sept | 09.33 | 22.13 | 00.07 | 12.33 | 01.07 | 13.33 | - | 12.03 | 00.52 | 13.18 |
| 25. Sept | 10.53 | 23.32 | 01.13 | 13.53 | 02.13 | 14.53 | 00.43 | 13.23 | 01.58 | 14.38 |

Sosialurin

5 707265 100036 >